# Rúslás í hvønn bil í 2012

**– Rúslás á bilum eiga at verða kravd í Norðurlondum, heldur norðurlendska ráðið fyri ferðslutrygd**

KOYRING
*Snorri Brend*





*Rúsláṡið er einfalt tól, men sum kortini kann spara hópin av mannalívum*

Í fyrstu syftu ynskir ráðið at fáa í lag eina royndarskipan við tvungnum rúslásum, skrivar svenska blaðið Norrbottens-Kuriren.

Nýtslan av rúsevnum er í vøkstri í øllum Norðurlondum, og av tí sama gerast tey alsamt fleiri sum koyra ávirkað. Ferðslutrygdarráðið hevur tí samtykt eina niðurstøðu, har sagt verður, at øll Norðurlond eiga at gera eina felags roynd við rúslásum, skrivar svenska blaðið í dagsins útgávu.

Rúslásið er ein teknisk innrætting, sum skráetur um persónurin handan rattið hevur drukkið. Hevur hann tað, so ger tólið tað ógjørligt hjá viðkomandi at seta bilin í gongd.

Í Noregi hevur Motorførernes Avholdsprosjekt kravt at hesi lásini verða sett í allar hýruvognar og bussar í landinum.

– Sohvørt sum tann tøkniliga menningin fer fram, kunnu vit vænta at rúslásini eisini gerast bíligari, sigur Thomas Carlsson í svenska felagnum fyri ferðslutrygd. Ráðið heldur, at innan 2012 eigur ein bert at kunna fáa bilar til keyps, sum hava hesi rúslásini.

Leiðarin í norðurlendska ferðslutrygdarráðnum, finski Matti Jarvinen heldur ikki, at rúsdrekkakoyringin í Finnlandi er økt nakað serligt, síðani landið slepti eykagjaldinum fyri rúsdrekka í fjør.

- Ein frágreiðiðng kann vera, at tey sum drekka meiri aftaná broytingina, drukku meiri frammanundan, heldur hann.

# – Rúslásið kann bjarga mannalívum

**Forkvinnan í Ferðslutrygd, Rúna Sivertsen er júst afturkomin av ráðstevnu í Svøríki, har tosað varð nógv um nýggja rúslásið til bilarnar**

KOYRING
*Snorri Brend*

Á ráðstevnuni varð víst á, at hetta rúslásið kann vera við til at bjarga hundraðtals mannalívum í ferðsluni.

Tað er ikki bert tann drukni bilførarin, sum er í vanda, men so sanniliga eisini tey, sum á annan hátt ferðast á og fram við vegunum.

Ætlanin er at halda fram við arbeiðinum at minka um rúsdrekkakoyringina, og verður framvegis arbeitt við at Svøríki skal gerast ein royndarland á hesum øki.

Hvørt ár doyggja eini 150 fólk í ferðsluni orsakað av rúsdrekkakoyring í Svøríki. Samanlagt doyggja eini 500 fólk um árið í øllum Norðurlondum.

- Við hesum lásinum kunnu nógv mannalív verða spard, sigur hon.

Rúna Sivertsen fegnast tí um, at nú verða stig tikin til at steðga hesum í norðurlendskum høpi.

Tey fara tí at fylgja við gongdini í Norðurlondum, áðrenn nøkur stig verða tikin her á landi í hesum sambandi.

## Rúsdrekka og ferðsla eitt stórt vandamál

**Norðurlendska Ferðslutrygdaráðið hevur í vikuskiftinum ársfund við Storforsen í Älvsby í Svøríki.**

**Hvørt ár ger ráðið eina yvirlýsing um eitt av størstu vandamálunum í ferðsluni.**

**Ein frágreiðing, sum ráðið hevur gjørt vísir, at rúsdrekkatrupullleikin er vaksandi í Norðurlondum.**

**Við á fundinum fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd eru Rúna Sivertsen, formaður og Jón Kragesteen, dagligur leiðari á RFF**

YVIRLÝSING

Á NTR ársfundinum við í Älvsby í Svøríki 15.- 18. september 2005 varð henda yvirlýsingin samtykt:

Norðurlond mugu leggja doyðin á arbeiðið á móti vaksandi rúsdrekkakoyring. Í tráð við hetta stuðlar Norðurlendska Ferðslutrygdaráðið Svøríki í ynskinum at gerast royndarland í EU. Eftir verkætlanini skal alkolás verða lógarkravt í øllum bilum. Harumframt skal virkast fyri, at royndarøkið verður víðkað til øll norðurlond frá árinum 2012. Higartil hevur tálmandi alkoholpolitikkurin í flestu Norðurlondum hildið rúsdrekkanýtsluni á einum lutfalsliga lágum støði. Men henda siðvenja stendur nú fyri stórum broytingum, við tað at prísirnir lækka og rúsdrekka gerst lættari at fáa hendur á.

NTR leggur seg ikki út í alkoholpolitikkin, men staðfestur at tað er skilligt samband millum økta alkoholnýtslu og økta rúsdrekkakoyring.

Tískil er rúsdrekkakoyringin ein samfelagssosialur trupulleiki í sera breiðari merking. Tað krevur í fyrsta umfari, at allir partar, ið hugsast kunnu, fara undir serlig átøk í móti hesum.

Í framtíðini fer at bera til at loysa trupulleikin við rúsdrekkakoyring við hjálp av tøkni. Alkolásini, sum eru til taks í dag eru dýr og eru tøkniliga krevjandi. Men tøkniliga menningin gongur skjótt framá, og komandi árini kunnu vit vænta okkum eina røð av nýggjum tøkniligum skipanum. Við tíðini verða lásini bíligari og meiri nýtsluvinarlig, og tað fer at økja um eftirspurningin.

Norðurlendska Ferðslutrygdar Ráðið metir, at munadygg hugburðstilbúgving eigur at stuðla bilídnaðurin í at koma við nøktandi tekniskum standardloysnum í bilum til norðurlendska marknaðinum, í seinasta lagi 2012.

Norðurlendska Ferðslutrygdarráðið, Nordisk Trafiksikkerheds Råd, stytt NTR, er ein norðurlendskur "regnsskjólsfelagsskapur" fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd í Føroyum, Umferðarstofuna í Íslandi, Nationalföreningen för Trafiksäkerhetens Främjande í Svøríki, Liikenneturva í Finnlandi, Rådet for Större Færdselssikkerhed í Danmark og Trygg Trafikk í Noregi.

BYGGIBÚÐ

damor




Glasbyggisteinar
- Nosligt og pent
- Tekur seg sera væl út inni á baðiverilsinum
- 19x19 cm




Alutrappistigi
- Góð góðska
- Lastar 150 kg
- 3 trin




Villasett
- Spaki og Kustur




Vaterpas
- týsk góðska

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor